## VIÐMERKINGAR

# Munnligur fyrispurningur til løgmann....

**....Um brot á stýrisskipanarlógina tá danskar lógir verða lýstar í Føroyum uttan løgtingsviðgerð ella løgtingssamtykt**



**Hergeir Nielsen**
*løgtingsmaður*
*Á løgtingi 29. november 2004*

1. Hvat hevur løgmaður gjørt - ella hvat ætlar hann at gera - til tess at støðga undirgravingi av løgtingsins myndugleika og brotunum á stýrisskipanarlógina, sum verða framd, nú danskir myndugleikar lýsa eina røða av lógum og kunngerðum at galda í Føroyum, sum hvørki hava fingið viðgerð ella eru samtyktar á løgtingi?

2. Hevur landsstýrið góðkent hesa framferð hjá donskum myndugleikum - og um so er, hvør hevur ábyrgdina av hesum brotum á vunnu rættindinunum hjá Føroya Løgtingi?

3. Rindar landsstýrið fyri, at hesar lógir, sum undirgrava fólkaræði føroyinga verða kunngjørdar í Kunngerðablaðnum?

4. Hevur sitandi landsstýrið játtað at gjalda fyri at kunngera tær hernaðarlógirnar, ið danskir myndugleikar lýstu í Føroyum, hóast undanfarna landsstýri og eitt samt løgting mótmælti og kravdi tær afturtiknar?

**Viðmerkingar**

Í vikuni kom Kunngerðablaðið B við postinum. Har vórðu lýstar fleiri danskar lógir og kunngerðir at galda í Føroyum. M.a.:

– Broytingar í Nato-sáttmálanum
– Kunngerð um rentugjald fyri skuld, ið er fallin til gjaldingar
– Lóg um altjóða dómstólin fyri krígsbrotsverk

Onki av hesum er samtykt á Føroya Løgtingi.

Sostatt eru tey vunnu rættindini hjá Føroya Løgtingi skúgvað til viks við einum pennastroki. Løgtingið hevur í fleiri ættarlið barst fyri at staðfesta sín rætt sum evsta vald í Føroyum og fyri, at ongin kann taka avgerðir um føroysk mál uttan um Løgtingið

Nú verða lógir lýstar at galda fyri Føroya fólk, sum hava stóra ávirkan á rættartrygd hins einstaka og fyri samfelagið alt, uttan at Føroya fólk hevur allarminstu demokratisku ávirkan á hetta.

Hetta minnir mest av øllum um, at einaveldið hjá Kongi er sett í gildi aftur.

Hetta er samtundis greitt brot á stýrisskipanarlógina, har m.a. kann vísast til hesar greinar:

*"§ 15. Løgmanni, landsstýrismonnum og løgtingsmonnum eru heimilað at seta fram uppskot til løgtingslógir, ríkislógartilmæli og aðrar samtyktir.*

*Stk. 2. Uppskot til løgtingslóg ella ríkislógartilmæli kann ikki verða endaliga samtykt, uttan at tað hevur fingið tríggjar viðgerðir á løgtingi. (...)*

*§ 47. Áheitan á ríkismyndugleikarnar um at seta í gildi fyri Føroyar ríkislóg ella kongliga fyriskipan, sum setur í gildi ríkislóg fyri Føroyar, kann bert verða gjørd við ríkislógartilmæli. (...)*

*§ 51. Landsstýrið umboðar heimastýrið mótvegis ríkismyndugleikunum.*

*Stk. 2. § 52, stk. 2 og 3, galda á sama hátt í hesum førum. (...)*

*§ 52. Landsstýrið hevur málsræði í førum, sum heimastýrinum er heimilað at tingast við og gera avtalur við onnur lond.*

*Stk. 2. Uttan samtykki løgtingsins kann landsstýrið tó ikki gera avtalur, sum krevja luttøku løgtingsins fyri at verða útintar, ella sum annars eru týdningarmiklar.*

*Stk. 3. Samstundis sum slík avtala verður løgd fyri løgtingið til góðkenningar, boðar landsstýrið frá, hvørjar løgtingslógir og hvørji ríkislógartilmæli, neyðug eru, til tess at millumlandasáttmálin kann verða útintur.*

Samanumtikið er sostatt talan um eitt sera grovt og álvarsligt brot á Løgtingsins heimildir.

Hetta ásannaði eitt samt løgting eisini í málinum um hernaðarlógirnar, ið vórðu lýstar at galda í Føroyum í 2002.

Í løgtingsmáli nr. 119/2002 verður sagt í viðmerkingunum:

*"Í seinastu viku hendi eitt álvarsligt skifti í stýrisskipanarviðurskiftum Føroya. Danska stjórnin setti av sínum eintingum eina røð av lógum og kunngerðum í gildi í Føroyum móti vilja Løgtingsins.*

*Hetta er sera álvarsamt.*

*Fyri at forða fyri, at hetta mál í 55 ára gomlu søgu heimastýrisins skapar fordømi fyri, at hetta verður vanlig mannagongd frameftir, verður mælt til, at hesar lógir kunngerðir etc. verða tiknar av í stundini. Hervið verður staðfest tað, sum higartil hevur verið galdandi siðvenja í Føroyum, at eingin ríkislóg fær gildi, uttan at tingið samtykkir tað."*

Nú er henda manngongd so víðkað til at galda fyri eini røð av øðrum økjum eisini, og tí verður roknað við, at løgmaður longu hevur tikið stig til at mótmæla og støðga hesi gongd.

# Avleiðingar av samanlegging av valdømum - læran frá Grønlandi

**Sámal Matras Kristiansen,**
*samfelagsfrøðingur*

Í fimmaranum í seinastu viku var áhugavert kjak um møguleikan at leggja øll sjey valdømini saman í eitt valdømi. Grundgevingarnar vóru nógvar, m.a. meiri rættvíst býti av løgtingslimum - bæði millum flokkar og millum øki. Ein onnur grundgevin var, at soleiðis fáast fleiri kvinnur upp í føroyskan landspolitikk.

Eg ringdi sjálvur inn til fimmarin, og varð m.a. eisini siteraður úr einum lesarabrævi í Dimmalætting í avgust, har m.a. stóð: "*Uttan valdømi fer tað nevniliga treytaleyst at henda tað óhepna, at enn færri samfelagsbólkar verða umboðaðir á tingi. Ein valskipan við einum valdømi fer at merkja, at løgtingsmannnastarvið verður eitt elitert starv, har tey dugnaligastu sleppa framat.*"

Eftir kjakið kundi eg ikki lata vera við at hugsa um nógv nevnda dømið "Grønland", har einans eitt valdømi er. Eg sett meg frammanfyri telduna, fór inn á heimasíðurnar: www.statgreen.gl og www.nanoq.gl og framdi eitt sindur av talknúsarii, og fann fram til m.a. hesi úrslit:

| A<br>**Øki við tingumboðan** | B<br>**Tinglimir** | C<br>**Harav kvinnuligir tinglimir(D/B)** | D<br>**Íbúgvar** | E<br>**Íbúgvar fyri hvønn tinglim** | F<br>**Íbúgvar fyri hvønn vinnuligan tinglim (D/C)** |
|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk+Nuussuaq | 21 | 7 | 14.715 | 701 | 2102 |
| Narsaq | 2 | 0 | 2.033 | 1017 | - |
| Maniitsoq | 2 | 0 | 3634 | 1817 | - |
| Sisimiut | 2 | 1 | 5.978 | 2989 | 2989 |
| Onnur øki | 4 | 1 | 30.494 | 7624 | 30.494 |
| **Samanlagt** | **31** | **9** | **56.854** | **1834** | **6317** |

Her sæst soleiðis, at 21 av 31 tinglimum (67,7%) av øllum landstingslimunum koma úr Nuuk ella Nuussuaq (svarandi til t.d. Tórshavn og Hoyvík), ið liggja í Nuuk kommunu. Hinvegin hevur Sisimiut (svarandi til t.d. Klaksvík) bert 2 av 31 tinglimum.

Tað, ið brestir í eyguni er hvussu "bíligur" ein tingmaður úr Nuuk er. 701 er bert gott og væl ein triðingur av landmiðal, ið er 1834. Hinvegin kostar tingmaðurin í Sisimiut 2989 atkvøður, ella meiri enn 4 ferðir so nógv sum í Nuuk; næstan tvær ferðir landsmiðal. Umframt Sisimiut og Nuuk eru tvey støð, ið hava 2 ella fleiri landstingslimir búgvandi, nevniliga Narsaq og Maniitsoq. Sostatt eru 27 av 31 tingmonnum (87,1%) umboðandi 26.369 íbúgvar; nakað væl minni enn helminingin av grønlendsku íbúgvunum. Hini 30.494 mugu noyðast við lúsa 4 tingmenn, ið sostatt kosta 7.624 atkvøður í part!!! Hetta síðsta talið er so himmaskríggjandi absurd, at eg trúði ikki mínum egnu eygum tá tað koma fram á roknimaskinuni hjá mær.

Um man kann vænta, at eitt felags valdømi í Føroyum fer at hava somu avleiðingar, so fer býtið av tingmonnum væntandi at vera hetta:

- Tórshavn og forstaðir: 21 tingmenn.
- Klaksvík, Runavík og Tvøroyri: 2 tingmenn í part.
- Restin av landinum kanska 5 tingmenn, meiri ella minni spjaddir um landið.

Við øðrum orðum kunnu vit - um úrslitini í Grønlandi kunnu yvirførast til føroysk viðurskifti (og hví kunnu tey í grundini ikki tað?) - vænta okkum eitt himmalrópandi demokratiskt órættvísi, um valdømini verða løgd saman í eitt. Rætt er, at Sandoyggin eigur nakrar bíligar tingmenn í dag. Men hyggur man eftir Grønlandi, so eru tingmenninir hjá Nuuk uppaftur bíligari (14.715/21=701 í Nuuk og 1.461/2=731 í Sandoyar valdømi) So, jú: Politikarastarvið er vorðið eitt høvuðsstaðarstarv í Grønlandi. Eingin ivi um tað. Og tað sama fer óivað at henda í Føroyum um eitt valdømi verður veruleiki.

Eitt annað argument til fyrimuns fyri samanlegging av valdøminum er at soleiðis fáa vit fleiri kvinnur valdar á ting. Hyggja vit eftir Grønlendska døminum, so er hetta ivaleyst ein røtt eygleiðing. Í Grønlandi eru 9 kvinnuligir tinglimir, ella 29% av landstinginum. Hetta er tríggjar ferðir so nógv sum í Føroyum, so í hesum máli hava forsprákararnir fyri samanlegging av valdømunum rætt: Tað skapar ivaleyst betri fortreytir fyri kvinnuligar tinglimir. Men fyri hvørjar kvinnur? Talknúsingin hjá mær vísir, at 7 út av 9 kvinnuligum tinglimum eru úr Nuuk kommunu. Sostatt fór eg helst ikki skeivur, tá eg í avgust mánaði skrivaði: "*Við einum valdømi verða tað tey lærdu - tey, ið búgva á størru plássunum - ið taka valdið, tí tey snøgt duga betri at orða seg gjøgnum miðlarnar. Tá er væl hugsandi, at fleiri kvinnur koma á ting… men neyvan tær kvinnur, ið hoyra útjaðaranum ella lægru stættunum til.*"

Men eg skal geva Georg Petersen rætt tá hann í fimmaranum kritiseraði meg fyri at geva ábendingar um, at "elita" og "havnarfólk" eru tað sama. Hetta er sjálvandi ikki heilt rætt, og eg orsaki tað eg segði hesum viðvíkjandi. Men hóast hetta er mín greiða niðurstøða eftir "surfingina" á grønlensku heimasíðunum, at Føroyar so sanniliga ikki eiga at gerast eitt valdømi. Heldur eiga vit at finna fram til eina skipan, ið megnar at umboða so nógvar føroyingar sum gjørligt; so nógvar bygdir sum gjørligt; so nógvar sosialar bólkar sum gjørligt. Tað er demokrati í mínari verð.

| Landstingslimir | Bústaður |
|---|---|
| Per Rosing-Petersen | Nuussuaq |
| Hans Enoksen | Nuuk |
| Per Berthelsen | Nuussuaq |
| Finn Karlsen | Narsaq |
| Jakob Sivertsen | Tasiilaq |
| Anthon Frederiksen | Ilullissat |
| Josef Motzfeldt | Nuuk |
| Augusta Salling | Nuuk |
| Aqqaluk Lynge | Nuussuaq |
| Isak Davidsen | Maniitsoq |
| Otto Jeremiassen | Kangaatsiaq |
| Ellen Christoffersen | Nuuk |
| Palle Christiansen | Sisimiut |
| Per Skaaning | Nuuk |
| Agathe Fontain | Sisimiut |
| Ane Hansen | Aasiaat |
| Kuupik Kleist | Nuussuaq |
| Henriette Rasmussen | Nuuk |
| Ole Dorph | Nuuk |
| Jørgen W. Johansen | Nuuk |
| Enos Lyberth | Maniitsoq |
| Ole Thorleifsen | Nuuk |
| Jonathan Motzfeldt | Nuuk |
| Kalistat Lund | Narsaq |
| Ruth Heilmann | Nuuk |
| Aqqalukasik Kanuthsen | Nuuk |
| Georg Olsen | Nuuk |
| Simon Olsen | Nuuk |
| Doris Jakobsen | Nuuk |
| Astrid Fleischer Rex | Nuussuaq |
| Marie Fleischer | Nuuk |